VIÐMERKINGAR

## Yvirlýsing um miðnámsdepil við Marknagilsvegin

**Fyri lærararáðið við Tekniska Skúlan í Tórshavn Jeffri Olsen formaður**

Lærararáðið á Tekniska Skúla í Tórshavn heitir við hesum á avvarandi myndugleikar at halda fast við skilagóðu ætlanina um miðnámsdepil við felags skúlaumhvørvi fyri studentaskúla, handilsskúla og tekniskan skúla.

Tað er greitt, at verandi skúlabygningar mega haldast í nýtiligum standi til skúlaendamál, so leingi teir skulu nýtast sum skúlar. Men heldur enn at brúka nógvan pening til útbygging av verandi skúlum, mæla vit til av álvara at fyrireika byggingina við Marknagilsvegin.

Hóðast vit taka undir við Storm P. gamla, at ”ilt er at spáa, serliga um framtíðina”, er tað kortini eyðsað, at føroyska samfelagið verður betur fyri at møta framtíðarinnar ókendu krøvum til útbúgving á miðnámsskúlaøkinum við einum fjølbroyttum miðnámsdepli, enn við handilsskúla, tekniskum skúla og studentaskúla hvør sær.

Vit loyva okkum at vísa á, at leiðslurnar á teimum trimum skúlunum eru samdar um og taka fult og heilt undir við hugsanini um miðnámsdepil.



## Suðuroyingar hava ikki búskapar- men hugburðskreppu

**Abraham Mikladal**
*Klaksvík*

Suðuroyggin er ikki verri fyri, enn eitt nú Norðoyggjar eru. Um hugt verður eftir búskapartølum fyri Suðuroynna og Norðoyggjar, sæst, at hesi bæði økini eru meinlík.

56% av íbúgvunum í Norðoyggjum hava lønandi arbeiði, meðan 50% av íbúgvunum í Suðuroy hava lønandi arbeiði. Hinvegin fáa 80,6% av íbúgvunum í Norðoyggjum løn og/ella almannaveiting, og fyri Suðuroynna er talið 81,3%.

**Hugburðskreppa**
Verður hugt eftir miðalinntøkuni fyri hvønn lønmóttakara í Norðoyggjum sammett við tann í Suðuroynni, vísa tølini, at lønmótakarin í Suðuroy fær 3.061 krónur meiri í løn um árið enn lønmóttakarin í Norðoyggjum.

Tá aðrar veitingar (ALS, Almannastovan o.a.) eru tiknar við tjenar ein suðuroyingur 558 krónur minni enn norðoyingurin um árið.

Sostatt vísa tølini, at Suðuroyggin er einki verri fyri búskaparliga, enn Norðoyggjar eru, men heldur nógv verri fyri hugsjónar- og hugburðsliga.

**Stórur óvjavni innanoyggja**
Tølini vísa heilt greitt, at tað sum heild ikki er nevniverdur munur á Suðuroynni og Norðoyggjum, men um hugt verður eftir Suðuroynni fyri seg, gerst greitt, at stórur munur er á norðari parti í mun til sunnara part. Vágur er illa fyri, men skjótt á veg uppeftur.

Men tað er ikki Vágur, vit hoyra nakað til í fjølmiðlunum, men Tvøroyri, sum als ikki er so illa fyri sammett við onnur støð norðanfjørs.

**Innanoyggja ósemjur hava forða og forða framvegis**
Suðuroyggin hevur ikki megnað at staðið sum ein maður (oyggj). Um so var, at fólkið í oynni dróg eina línu og ikki nýtti sína orku til at finna syndabukkar norðanfjørs, so var støðan ein heilt onnur.

Ja, eg ivist ikki í, at ein oljuútgerðarhavn hevði ligið eina ella aðrastaðni í Suðuroy í dag (kanska ikki á Tvøroyri).

**Heil og hálv almenn arbeiðspláss**
Suðuroyggin er heldur ikki verri fyri enn Norðoyggjar, um hugt verður eftir almennum arbeiðsplássum, so sum sjúkrahúsi, skúlum og stovnum. Miðfyrisitingin er ikki farin betri ella verri við Suðuroynni enn Norðoyggjum.

**Samstarv neyðugt**
Skal framburður verða í Suðuroynni er neyðugt, at suðuroyingar samstarva og gevast at finna syndabukkar aðrastaðni, men manna seg upp og taka í egnan barm.

Skal eitt øki sum Suðuroy verða áhugavert og innbjóðandi fyri fólk, hugskot og kapital er neyðugt at samstarva, finna felags loysnir og at marknaðarføra økið sum eitt attraktivt og vælvirkandi stað. Norðoyingar vilja fegin rætta Suðuroynni eina hjálpandi hond.

| | Norðoyggjar | Suðuroyggin |
|---|---|---|
| Fólkatal | 5921 | 4959 |
| Arbeiðsloysi | 4% | 6% |
| Vinnutal | 56,6% | 50,0% |
| Veitingartal | 80,6% | 81,3% |

| | Útgjaldingar | Tal av lønmóttakarum | Meðalinntøka | Prosent |
|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | |
| Vinnulønir | 507 mió. | 3349 | 151.484 | 84,9% |
| Aðrar veitingar (ALS o.a.) | 90 mió. | 1423 | 63.219 | 15,1% |
| Samanlagt | 597 mió. | 4772 | 125.164 | |
| **Suðuroy** | | | | |
| Vinnulønir | 384 mió. | 2478 | 155.085 | 76,5% |
| Aðrar veitingar (ALS o.a.) | 118 mió. | 1552 | 75.942 | 23,5 |
| Samanlagt | 502 | 4030 | 124.606 | |

Kelda: Hagstova Føroya

## Skúladepilin við Marknagilsvegin

**Mads A Winther,**
**Egon Øregaard**
**Ragnar Magnussen**
*Føroya studenta og HF skeið*
*Tekniski Skúlin í Torshavn*
*Føroya Handilsskúli*

Undirritaðu skúlastjórar á Føroya Handilsskúla, Tekniska Skúlanum í Tórshavn og Føroya Studentaskúla og HF-skeiði vilja gera vart við, at vit framvegis við heilum huga taka undir við ætlanini um skúladepil við Marknagilsvegin, og vit meta, at ein samlað loysn er best fyri skúlaverkið sum heild.

Hesa seinastu tíðina hevur nakað verið skrivað um skúladepilin við Marknagilsvegin. Tað var Signar Brúnni fyrrverandi landsstýrismaður, sum kom við hugskotinum at byggja nýggjan Studenta- og Tekniskaskúla við Marknagilsvegin, har handilsskúlin og Skúlaheimið hjá Tekniska skúla í Tórshavn nú liggja. Tað var Eilif Samuelsen fyrrverandi landsstýrismaður, sum kom við uppskotinum at byggja nýggjan Studentaskúla, tá ið Føroya Studentaskúli fór um tey seksti.

Hugskotið um at byggja ein skúladepil við Marknagilsvegin kom uttan iva av, at tørvur var at byggja ella gera munandi ábøtur á verandi Studentaskúla og samstundis loysa hølistrupulleikarnir á Tekniska skúla. Harafturat var handilsskúlin vorðin alt ov lítil. Hetta vóru skúlamyndugleikarnir fullgreiðir um. Her vóru sostatt tríggir skúlar, sum allir hava hølistrupulleikar, kanska hvør á sín hátt. Í ætlanin var sjálvsagt, at á plássinum var stórt skúlaheim, tøkt byggiøki og ein skúli frammanundan.

Hugskotskapping varð útskrivað og vinnari funnin fyri góðum ári síðani. Málið steðgaði síðani upp og hevur meira ella minni ligið í dvala. Á fundi, várið 1999, vóru skúlaleiðslurnar kunnaðar um, at skúladepilsætlanin nú var útsett til 2003. Hetta kom dátt við. Heitt var á myndugleikarnar, at ávís upphædd var játtað, so arbeiðast kundi við at fyrireika byggingina, men var hetta ikki játtað. Málið steðgaði síðani upp. Rættast hevði verið at arbeitt víðari við málinum og fingið eina góða loysn, sum hevði verið okkara ungdómi at gagni í framtíðini.

Nú um dagarnar er aftur lív komið í málið. Ikki at fremja verkætlanina, men at jarðleggja hana. Summi eru farin í sjálvdrátti heldur enn at arbeiða fram móti eini felags loysn, sum einaferð í framtíðini verður ein góð loysn. Teir, sum mótarbeiða skúladeplinum, føra fram, at hann verður alt ov dýrur. Ja, depilin fer sambært ”kønum” monnum og nøkrum tingmonnum og at kosta um 500 mió krónur ella kanska meira. Hetta er ikki samsvar við veruleikan. Depilin verður um 15.000 fermetrar. Er fermeturprísurin 20.000 kr. verður samlaði kostnaðurin um 300 mió krónur og ikki 500 mió, sum sagt hevur verið.

Spurningurin er tí, hvat kostar at byggja afturat Studentaskúlanum, og hvat fæst burturúr? Hvat kostar at byggja ein nýggjan Tekniska skúla? Verður prísur og tað sum fæst burturúr skúladeplinum samanborið við at útbyggja Studentaskúlanum er eingin ivi um, hvat er best at gera. Vert er eisini at hugsa um, at nýggja námsfrøðin krevur meira pláss enn tann gamla, sum var tengd at ídnaðarsamfelagum. Rom var ikki bygdur eftir einum degi, heldur ikki eftir einum ári. Soleiðis er eisini við skúladeplinum. Tað verða kanska 15 ár frá nú av til depilin er liðugur.

Vónandi fer tingið ikki at samtykkja uppskotið hjá teimum, sum vilja broyta verkætlanina við skúladeplinum við Marknagilsvegin. Hugsið frameftir! Hugsið nýtt! Her skal stórur partur av føroyska ungdóminum halda til í fleiri ár av sínum unga aldri. Ungdómurin er keldan til lív. Her skal ungdómurin fáa íblástur, hugflog, dirvi og vitan, sum hann skal byggja sína framtíð á. Ikki bara sína egnu framtíð, men framtíðina hjá føroysku tjóðini. Tí hevur avgerðin nógv at siga. Leiðslur skúlans hava longu nú biðið um fund við landsstýrismannin í undirvísingarmálum at umrøða spurningin.

Vónandi fer tingið ikki at samtykkja uppskotið hjá teimum, sum vilja broyta ætlanina við skúladeplinum við Marknagilsvegin. Hinvegin heita vit á Føroya løgting longu í ár at játta pening at reika fyri verkætlanina.

# ítróttur

Nr. 27 • hósdagur • 8. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dómarar fara á skeið



*Eins og spælararnir eru dómararnir nú eisini farnir at fyrireika seg til komandi kappingarár*

**Fyrsta vikuskiftið í mars fara føroysku fótbóltsdómararnir at savnast**

DÓMARAR
*Jákup Mørk*

Afturvendandi skeiðið fyri dómarar verður á Hotel Føroym, vikuskiftið 2.-4. mars.

Talan er sum nevnt um eitt afturvendandi skeið, har føroysku dómararnir av álvara fara undir fyrireikingar til kappingarárið, sum nú stendur fyri framman.

Enn er eingin endalig skrá løgd fyri tiltakið, men dómarunum er upplýst, at millum skeiðsleiðararnar verður m.a. Knud Stensgaard úr Danmark. Knud telist millum altjóða góðkendu donsku dómararnar, og ivaleyst kann hetta tí nýtast sum eitt slag av íblástri hjá heimligu dómarunum.

Undirtøkan fyri skeiðnum hevur vanliga verið góð, og einki er at ivast í, at dómarar kring landið longu nú eru farnir at síggja fram til hetta.

## ÍF og GÍ skifta um

**Fuglfirðingarnir í GÍ økjast í tali, men nú er ferðslan av leikarum eisini farin at ganga øvuga vegin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flytingar millum føroysk fótbóltsfeløg eru vorðnar alt meira vanligar seinnu árini. Ikki minst tykist hetta vera galdandi í økjum, har eitt felag hevur vunnið sær hevd millum hini, og soleiðis tykist eisini vera í Gøtu.

Í fjør spældu teir báðir fuglfirðingarnir, Áslakur Petersen og Bartal Eliasen, við á GÍ liðnum, og til komandi ár tykist greitt, at eisini Eyðolvur Petersen flytir úr ÍF til GÍ.

**Báðar vegir**
Talan er tó ikki bert um einvegis ferðslu millum bygdirnar báðar. Fyri góðum mánaði síðani var greitt, at Pauli Jarnskor í ár skal venja fuglfirðingar, og til hetta tykist hann nú eisini at hava fingið styrk frá einum av bygdamonnum sínum.

Heini Heinason hevur ikki leikt so nógv á besta GÍ liðnum, men fyri teir næst bestu hevur hann skotið hópin av málum seinnu árini. Sum skilst, hevði hann ongar ítøkjuligar ætlanir um at spæla fótbólt í ár, men nú hevur hann so gjørt av at royna seg í Fuglafirði. At hetta er kærkomin styrkur hjá ÍF, er einki at ivast í. Ikki minst, nú teir ikki longur kunnu líta á málini frá Eyðolvi.

Spurdur, um hetta er nakað sum órógvar seg sum venjara, svarar Pauli Jarnskor, at tað ger tað sum so ikki.

– Sjálvandi er tað altíð keðiligt at missa spælarar, men tað má mann so bara taka við. Hevur ein leikari ambitiónir um at spæla í bestu deildini, so mugu vit sjálvandi góðtaka tað, sigur Pauli.

Sjálvur leggur hann annars dent á, at hann so avgjørt ikki hevur roynt at ávirka spælarar til at flyta annan ella annan vegin.

– Nei, tað royni eg at halda meg langt burtur frá, sigur Pauli Jarnskor at enda.

## Flogbóltsstøður

Av misgávum vóru stigatalvurnar fyri flogbóltskappingina ikki við í týsdagsblaði okkara. Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar.

**Støðan, Meistaradeild Menn**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 12 | 9 | 3 | 30 | 17 | 13 | 13 |
| Mjølnir | 12 | 9 | 3 | 31 | 15 | 16 | 11 |
| Fram12 | 6 | 6 | 26 | 23 | 3 | 8 | |
| Fleyr | 12 | 6 | 6 | 22 | 21 | 1 | 8 |
| SÍ | 12 | 0 | 12 | 3 | 36 | -33 | 0 |

**Støðan, Meistaradeild Kvinnur**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Dráttur | 15 | 13 | 2 | 43 | 11 | 32 | 17 |
| Mjølnir | 14 | 13 | 1 | 40 | 9 | 31 | 17 |
| Fleyr15 | 6 | 9 | 20 | 33 | -13 | 7 | |
| ÍF | 14 | 6 | 8 | 21 | 29 | -8 | 9 |
| TB | 14 | 5 | 9 | 27 | 28 | -1 | 6 |
| Fossánes | 14 | 0 | 14 | 1 | 42 | -41 | 0 |

**Støðan, 1. Deild Menn**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| ÍF | 8 | 7 | 1 | 22 | 5 | 17 | 14 |
| Mjølnir b | 10 | 6 | 4 | 23 | 16 | 7 | 12 |
| Mjølnir a | 10 | 5 | 5 | 20 | 19 | 1 | 10 |
| Nøvan | 9 | 5 | 4 | 16 | 16 | 0 | 10 |
| Fleyr8 | 4 | 4 | 15 | 18 | -3 | 8 | |
| SÍ | 9 | 3 | 6 | 13 | 21 | -8 | 6 |
| NFL | 8 | 1 | 7 | 8 | 22 | -14 | 2 |

**Støðan, 1. Deild Kvinnur**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Fleyr | 7 | 6 | 1 | 20 | 7 | 13 | 12 |
| Nøvan | 7 | 5 | 2 | 17 | 11 | 6 | 10 |
| Dráttur | 7 | 4 | 3 | 15 | 15 | 0 | 8 |
| KÍF | 7 | 3 | 4 | 13 | 16 | -3 | 6 |
| SÍ | 7 | 2 | 5 | 12 | 15 | -3 | 4 |
| Mjølnir | 7 | 1 | 6 | 6 | 19 | -13 | 2 |

**Støðan, 2. Deild Menn**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| Nøvan | 6 | 4 | 2 | 15 | 10 | 5 | 8 |
| ÍF | 6 | 3 | 3 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| SÍ | 6 | 2 | 4 | 8 | 9 | -5 | 4 |

**Støðan, 2. Deild Kvinnur**

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | vunnir | taptir | vunnin | tapt | munur | Stig |
| TB | 10 | 10 | 0 | 30 | 1 | 29 | 20 |
| Mjølnir a | 11 | 10 | 1 | 30 | 7 | 23 | 20 |
| KÍF | 11 | 8 | 3 | 27 | 14 | 13 | 16 |
| Fleyr | 9 | 5 | 4 | 19 | 16 | 3 | 10 |
| Nøvan | 10 | 3 | 6 | 16 | 19 | -3 | 8 |
| ÍF | 11 | 3 | 8 | 12 | 24 | -12 | 6 |
| SÍ | 11 | 2 | 9 | 7 | 27 | -20 | 4 |
| Fossánes | 11 | 0 | 11 | 0 | 33 | -33 | 0 |